

*Eftir at hava ligið heilt frammi í oddinum, hevur NSÍ slaka nakað seinastu vikurnar, og eru nú fimm stig aftanfyri oddaliðið HB*

# HB fekk meiri enn fult

**Gøtumenn, sum eru komnir burtur úr ongum, eru nú fremsta hóttanin ímóti oddaliðnum**

SAMANUM 10. UMFAR

*Jóannes Hansen*

Sjøtul varð sunnudagin settur á seinna partin av landskappingini. Í botninum varð ikki nógv avklárað. Syndarliga ferðsluvanlukkan í Klaksvík fríggjakvøldið bar við sær, at dysturin, sum skuldi spælast á Eiði millum EB/Streym og TB var útsettur. Skála tiltuskaði sær eitt stig á heimavølli ímóti KÍ. Tað kemur sjálvandi væl við hjá skálamonnum, men tað fæst ikki at vita, hvussu stór nyttan í javnleikinum verður, fyrrenn EB/Streymur og TB hava spælt. Skálamenn vóna sjálvandi, at EB/Streymur vinnur øll stigini. Málið, sum Skála man hava, er at sleppa av aftasta plássinum og harvið undan beinleiðis niðurflyting og upp á níggjunda plássið, sum ber kvalifikatiónsdystir við sær. Í teimum stóðu skálamenn seg væl í fjør.

HB var allan fyrra partin av kappingini oddalið, og HB er oddalið, nú landskappingin er farin í fýra vikur langa summarfrítíð. Í stigum er leiðslan uppaftur meiri sannførandi, enn hon var undan vikuskiftinum. Tá vóru tvey stig niður til B68. Nú eru fýra stig niður til GÍ.

Serliga í Gundadali hevur tað roynst væl hjá HB, men sunnudagin var leikliga avrikið einki at reypa av so leingi, sum tað vóru ellivu á hvørjum liðnum. B68 dummaði seg og misti ein mann. HB tók av og vann. At dumma seg er ein partur av spælinum, og tað er eisini ein partur av spælinum at taka av, tá mótstøðuliðið hevur dummað seg.

Umframt ein B68 spælara, so leyp eisini ein NSÍ spælari framav í Runavík. Harvið misti NSÍ møguleikan at vinna seg uppaftur á næstfremsta plássið. Ikki minst á einum liði, sum vil og ætlar sær at vera millum tey fremstu, er tað alt avgerandi, at hugburðurin er rættur, og at spælararnir ikki leypa fram av. Um teir gera tað, so er møguleiki fyri, at tað kann kosta gull. Tað kunnu teir í B68 og NSÍ skriva undir uppá. Á vøllinum duga HB spælararnir nógv av tí – fyri ikki at siga alt – sum hinir duga. Tað sást eisini sunnudagin. Men HB spælararnir tykjast vita betri enn hinir, hvar dómaramarkið er, og tað hevur sera stóran týdning.

**Tætta stríðið**

GÍ hevur ikki verið sannførandi higartil. Men nú eru teir næstfremst, og tískil skal ansast eftir gøtumonnum. Sum vit nevndu fyri einari viku síðani, so megnaði GÍ fleiri ferðir í níti árunum eftir summarsteðgin at vinna FM, eftir at tað nógvu tey fyrstu umførini hevði verið so sum so.

At GÍ vann í Vági var óført avrik. Fyri viku síðani høvdu vit á orði, at tað styrkti nógv um GÍ liðið, at fleiri av gomlu stuðulsspælarnum nú eru aftur í Gøtu. Sunnudagin vann GÍ í Vági uttan fleiri av kreftunum, sum hava verið roknaðar millum tær berandi. Her verður hugsað um Bartal Eliasen, sum gongur á høkjum, Henning Jarnskor, sum er farin til skips, og Sámal Joensen, sum er burturstaddur, og sum sigst vera plágaður av ryggskaða.

Umframt um B68, so lupu gøtumenn m. a. bukk um NSÍ. Tá ið tað verður havt í huga, at teir meiri enn helmingin av tíðini spældu við tíggju monnum, kann tað ikki sigast annað, enn at NSÍ stóð seg væl ímóti B36. Tá hugsað verður um longsulin hjá NSÍ eftir at vinna FM og løgmanssteyp og eftir at vinna sær rættin at spæla í Europa Cup, so hava avrikini ikki verið nóg góð seinastu ferðirnar.

Fyri tveimum vikum síðani vóru HB og NSÍ jøvn í stigum. Síðani tá hevur HB vunnið á Skála og á B68. Í tennis plaga teir at tosa um, at spælarin, sum bara restar fáar bóltar í at vinna eina stóra finalu, fær gummiarm. Tað kundi verið líkt til, at NSÍ, eftir at hava vunnið seg fram í oddin í landskappingini, hevur fingið gummibein. Í trimum teimum seinastu umførunum hava teir bara fingið tvey stig (javnleik á Svangaskarði í framskundaða dystinum, tap ímóti KÍ og javnleik ímóti B36).

Við sigri á Skála kundi KÍ havt vunnið seg upp á næstfremsta plássið og harvið lagt upp til stríð um oddaplássið, tá HB 4. august skal til Klaksvíkar. Men klaksvíkingar vístu, at tað ber sera illa til at rokna teir út, og at teir harvið ikki kunnu metast at vera upplagdur avbjóðari hjá HB.

Undan heimadystinum ímóti HB er støðan hjá KÍ, sum hon var, tá teir fóru til Runavíkar. Tí verður spennandi at síggja, hvussu tað fer at spæla av, tá øll í føroyska fótbóltsheiminum, sum ikki eru svorðin HB viðhaldsfólk, fara at taka á við KÍ, sum sunnudagin 4. august fer at stríðast fyri at varðveita spenningin í landskappingini.

B36 skal í næsta umfarinum eftir summarsteðgin spæla ímóti HB. Tað er altíð opið, tá talan er um grannauppgerð í Gundadali. Men B36 tykist ikki vera girað til at stríðast um FM. Spurningurin er heldur, um talan fer at verða um broytingar í summarfrítíðini. Tá tað við ellivu monnum í meiri enn ein hálvleik ikki eydnast at vinna á tíggju NSÍ monnum, ber tað boð um, at ikki alt er, sum tað skal vera. Tað kunnu teir ikki vera nøgdir við í felagnum, sum vann FM og steypakapping í fjør, og sum so sera fegið vil verða roknað ímillum tey bestu.

## Ongi hagtøl við í blaðnum í dag

**Vegna serliga orsøk, hava vit tíverri ongin hagtøl úr 1.deild í fótbólti við í blaðnum í dag**



# B68 hjálpti HB at taka alt

**Toftamenn syrgdu fyri at koma í góða støðu, áðrenn teir mistu ein mann, og so gekk orkan undan ímóti oddaliðnum, sum leingi hevði ilt við at finna hugflogið**

HB–B68

*Jóannes Hansen*



*Andrew av Fløtum kann nú saman við hinum HB´arunum fara í summarsteðg, við tí sannføring, at havnarliðið er einsamalt oddalið.*

*Mynd Álvur Samuelsen*

Um teir á Toftum í summarsteðginum iðra seg um, at teir ikki eru oddalið í bestu deildini, so er tað væl skiljandi. B68 hevði sunnudagin møguleika til sum fyrsta liðið á árinum at fáa, so plaga danir at taka til, skovlin undir HB í Gundadali. B68 megnaði at skelka HB, men so spiltu toftamenn seg burtur. Teir vórðu undirmannaðir, og orkan, sum orsaka av nógvu dystunum seinastu tíðina, ikki var so stór, gekk undan. Tað hevði við sær, at sera væl skipaða verjuspælið, sum B68 megnaði fyrra umfarið, ikki hekk so væl saman. Eftiransingarnar vóru ikki tær, sum tær høvdu verið, og so dusaðu HB menninir, sum vóru tolnir, sær og skoraðu trý mál.

HB hevði annars havt merkiliga torført við at spæla seg til upplagdar málmøguleikar í 1. hálvleiki. Í fyrsta álopinum vóru teir ágangandi, men so var leingi lítil broddur í. B68 kom á odda í 14. minutti. Horna úr høgru og innlegg frá Arnoldi Joensen endaði við, at dómarin helt Hans á Lag hava rent Anders Nygaard um koll, og Øssur Hansen smekkaði úr ellivu metrum og upp í nettakið.

So vóru fyritreytirnar hjá B68 framúr, og toftamenn dugdu væl. Teir tóktust einki hava ímóti, at HB hevði bóltin mesta partin av tíðini. Heimamenninir megnaðu ikki at bróta ígjøgnum í borðunum, og Andrew av Fløtum og Jón Rói Jacobsen fingu ikki fløtu stikkbóltarnar, sum plaga at hava vandamiklar støður við sær. Í staðin varð talan um lítla ferð og bóltflytingar aftur og fram á miðvøllinum.

Hetta hóvaði B68 væl. Frammi á vøllinum høvdu teir Øssur Hansen og Anders Nygaard, sum hvør í sínum lagi megnaðu at leggja trýst á HB verjuna, tá bólturin kom fram á vøllin, og spurningurin er, hvussu dysturin hevði tikið seg upp, um Øssur Hansen eftir 20 minuttir hevði havt hepnið við sær. Eftir langt útspark frá væl spælandi B68 málverjanum kloddaði HB miðverjan orduliga. Bólturin endaði hjá púra blanka Øssuri, sum einar ellivu metrar úr málinum og eitt sindur til vinstru smekkaði til. Bólturin brast í handara stólpan og kitlaði hin stólpan, áðrenn hann fór út til innkast.

2–0 til B68 í Gundadali hevði kanska havt við sær, at summarstøðan í 1. deild hevði verið ein onnur, enn hon nú er.

Men so var tað, at B68 spilti spælið fyri seg sjálvt. Í samanbresti millum Fróða Benjaminsen og Rógva Jacobsen metti dómarin, at Fróði skuldi sektast. Tað vóru toftamenn ikki blíðir um, og Fríðin Ziskason leyp framav og tiltuskaði sær gula kortið. Fríðin stríddist væl á miðvøllinum, men tá spælið hjá honum er soleiðis, at hann ofta fær gult kort fyri takklingar kundi roknast við, at hann fór at fáa eitt gult kort afturat, og tað fekk hann stutt undan hvíldini, og harvið hevði B68 givið HB møguleikan at sleppa upp í part aftur.

At heimaliðið ikki var púra eiðasørt gav Rúni Nolsøe ábending um í 25. minutti, tá hann úr seytjan metrum sendi flatt eitt sindur úr høgru og í handara stólpan.

### Marginalirnir

Tá liðini komu aftur á vøllin, bendi B68 umskipingin á, at tað ráddi um at verja leiðsluna. Jan Petersen var eyka miðverji, Bogi Petersen vongverji og Øssur Hansen var miðvallari.

HB royndi at leggja trýst á, og tað tóktist vera ein spurningur um tíð, áðrenn tað skuldi eydnast teimum at fáa møguleikan at javna. Men bæði tá tað eydnaðist teimum at javna, og tá teir komu framum 2–1, høvdu teir dómaratekki. Í fyrra førinum hildu toftamenn seg eiga innkast í vinstru, eftir at John Heri Dam varð steðgaður í roynd at fara framvið Hans á Lag. Alt B68 liðið var á veg fram, tá linjudómarin segði, at HB átti innkastið. Tór–Ingar Akselsen, sum í 2. hálvleiki var meiri eyðsýndur, streyk til baklinjuna, og altíð vandamikli Jón Rói Jacobsen kom framum miðverjuna og stýrdi flata innlegginum í málið.

Jón Rói var eisini meistari fyri leiðslumálinum. Hans á Lag sendi langt fram eftir miðásinum, HB unglingaspælarin og B68 málverjin brustu saman, dómarin bríkslaði, og so rullaði bólturin síðstu átta metrarnar og inn um strikuna. Kropsburðurin og peikingin hjá dómaranum tóktust siga, at hann hevði bríkslað fyri frísparki til B68 ella kanska brotssparki, men tá HB spælararnir eina løtu høvdu fegnast um leiðslumálið framman fyri sínum áskoðarum og hjálpardómaranum, fór dómarin í lumman og skrásetti 2–1 til HB. Í hesum førinum var torført at fylgja handfaringini hjá dómaranum av ásetingunum.

Troyttu toftamenninir góvu skarvin yvir, HB hevði nógv pláss og dusaði sær, og 3–1 málið var náttúrlig fylgja av gongdini. Aftur hesa ferð kom innleggið úr høgru, og undir málinum stóðu tveir ella tríggir strípútir spælarar í bíðirøð. Hans á Lag stútaði, og harvið var tað rudduliga staðfest, at HB er oddalið.

Toftamenn høvdu sína vitjunartíð. Teir vóru óhepnir, tá Øssur Hansen hevði møguleikan at økja til 2–0, og teir spiltu seg burtur, tá teir mistu ein mann. HB tók av, tá teir fingu møguleikan. Teir vunnu aftur í Gundadali, og nú verður eyka hugaligt hjá teimum at fyrireika seg til ólavsøkuna.

HB: Bárður Johannesen – Hans á Lag, Jóhannis Joensen, Jan C. Dam, Janus M. Joensen – Tór-Ingar Akselsen, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Nicu Dogaru – Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum

B68: Michael Kokoszanek – Jan Petersen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira, John Heri Dam – Bogi Petersen, Fróði Benjaminsen, Fríðin Ziskason – Arnold Joensen, Anders Nygaard, Øssur Hansen



*Øssur Hansen skeyt sítt sjeynda mál í ár í Gundadali, og hevur aftur í ár verið ein av týdningamiklastu monnunum á toftaliðnum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*